

www.oljan.fo

**Jan Müller** 20 - 04 - 2012

# Metstórar íløgur í varandi orku

Londini í G20-bólkinum brúktu 6,5 prosent meiri til íløgur í varandi orku í fjør enn í 2010, og ES gekk á odda. Tað vísa tøl hjá Pew Charitable Trust og Bloomberg. Tilsamans brúktu G20-londini, sum eru tey størstu ídnaðarlondini saman við Kina, India og Brasil, 263 milliardir dollarar til íløgur í varandi orku í 2011 og av hesum stóð ES fyri teimum 100 milliardunum. Uppgerðin vísir, at tann størsti íløguvøksturin var í USA, og næst komu Kina, Týskland, Italia, Bretland og India. Mest til sólorku Tølini hjá Pew Charitable Trust og Bloomberg vísa, at tað var serliga sólorka, sum fekk nógvar íløgupengar í fjør, og samlagt fór sólorkan við meiri enn helminginum av øllum íløgunum, sum blivu brúktar til varandi orku í 2011. Sagt verður, at stórt prísfall gjørdi, at sólorkuíleggjararnir fingu meiri fyri pengarnar. Prísurin á sólorkueindum er nú heili 75 prosent minni enn fyri trimum árum síðani. Samstundis gjørdist tað bíligari at gera íløgur í vindorku, og her var tað Kina, sum gekk undan. Samanumtikið vísa tølini, at íløguvøksturin í varandi orku í fjør var størstur vestan fyri Atlantshavið við USA og Brasil sum drívmegi. Í Asia vuksu íløgurnar mest í India, Japan og Indonesia. Í ES var íløguvøksturin bara fýra prosent, men hóast tað var ES tað økið, sum brúkti mest til varandi orku í fjør, tilsamsns 99,3 milliardir dollarar, siga Pew Charitable Trust og Bloomberg.